tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Svartkjaftagullið

Oddagrein

ORÐIÐ svartkjaftur er aftur at síggja og hoyra í almenna orðaskiftinum. Hesin pinkufiskur, sum fáur av okkum hevur givið stórvegis fær um nú í mong ár, hóast hann er gullverdur fyri stóran part av okkara fiskivinnu, er nú aftur komin í „rampuljósið“. Tað er bráddliga aftur „in“ at tosa um svartkjaft.Orsøkin er tann, at um ikki so langa tíð verður hesin stovnurin kvoteraður, og hetta merkir, at føroyingar koma at fáa eina kvotu, sum neyvan røkkur til alla ta vinnu, sum í dag antin beinleiðis ella óbeinleiðis livir av hesum fiski.

SENDINGIN í sjónvarpinum mikukvøldið um júst svartkjaftin var ein av teimum góðu. Við relevantum spurningum og fjølbroyttum vinklum megnaði verturin - sum ikki einaferð - at seta ljóskastaran á eitt sera álvarssamt mál. Hvør eigur svartkjaftin, hvat fáa vit burtur úr honum, hvussu skal hann býtast í framtíðini osfr? So mikið týdningarmikil er hesin fiskur fyri føroyska samfelagið, at hann fer uttan iva at eiga stóran part av almenna orðaskiftinum næstu tíðina. Mangt bendir á, at svartkjaftagullið, ið svimur í føroyskum sjógvi, er og verður ikki minnandi týðandi enn tað svarta gullið, sum møguliga liggur undir havsins botni. Sera forvitnisligt og áhugavert at tað at kunna staðfesta, hvussu stóran týdning eitt einstakt fiskaslag hevur fyri so stóran part av flotanum, fyri flakatrolararnar, fyri rækjubátarnar, fyri nótabátarnar, fyri Havsbrún og fyri alivinnuna. Soleiðis kundi verið hildið fram at reksa upp allar tær vinnugreinar, sum antin beinleiðis ella óbeinleiðis liva av svartkjaftinum.

HESIN fiskurin hevur jú verið brúktur sum býtisfiskur við russar og norðmenn serstakliga í mong mong ár. Vit hava fingið dýrar rækjur og tosk í býti fyri svartkjaft. Og nú alivinnan er komin fyri at verða og tekur seg meira og meira inn á vanligu fiskivinnuna, er nettup svartkjafturin eitt av svarunum til hesa succes. Svartkjaftur er nevniliga týðandi partur av fóðrinum hjá alifiski.Men hvussu verður, tá kvotuavmarkingarnar koma? Verður tá nokk til allar tær ymsu vinnugreinarnar, til flakatrolarar, rækjubátar, nótabátar og fóðurvirki? Nú er so eisini tað nýggja komið inn í myndina, at vit fara at gera matvøru burtur úr svartkjaftinum úti á feltinum. Hetta er roynt fyrr við minni góðum úrsliti. Nú verður so aftur settur skjøtil á eitt nú við framleiðslu av surimi. At man í størri mun fer at brúka svartkjaft í beinleiðis matvøruframleiðslu er bara at fegnast um. Tað er so ein fjøltáttan av vinnuni.

EIN spurningur, ið tó hevur verið lítið frammi, er støðan hjá stovninum. Eru vit við at niðurfiska hann? Tá taka vit tilverugrundarlagið undan okkum. Og hvat við øðrum fiskastovnum, sum liva av svartkjafti? Her eru mangir spurningar at umrøða, og tí eigur tjakið um svartkjaftin at fáa eitt týðandi pláss í miðlunum í komandi tíðum. Er svartkjaftagullið við at gleppa okkum av hondum?

Sosialurin

Viðmerking:

Áheitan á landsstýriskvinnuna í Almanna-og heilsumálum

Vinarligast vegna Miðflokkin Jenis av Rana, løgtingsmaður

Fjølmiðlarnir bera í dag boðini um, at starvsfólk á landssjúkrahúsinum verða søgd úr starvi komandi dagarnar.Einasta grundgevingin fyri hesum uppsøgnum sigst vera neyðugar sparingar vegna ov lága játtan á løgtingsins fígggjarlóg, t. v. s. at hesar uppsagnir eru ikki grundaðar á neyvt útgreinaðar kanningar, ið vísa, at tørvur ikki er á núverandi tali av starvsfólkum, og at hetta tí eigur at verða minkað.

Neyvan er nakar føroyingur, ið ikki kennir vána støðuna, heilsuverk okkara er í eftir áralanga fíggjarliga niðurpíning. Dagligi tørvurin er fleiri starvsfólk, júst tað mótsatta av tí, leiðslan leggur upp til. Í staðin fyri at fara inn við einari bøtandi hond, verður steinur lagdur oman á byrðu teirra, ið frammanundan royna at fáa niðurpínda heilsuverkið at hóra undan.

Dupult ørkymlandi er at frætta, at partur av uppsagnunum sigst verða neyðugur fyri at fíggja enn eitt lag oman á ein yvirbygning, hvørs vøkstur seinastu mongu árini als ikki stendur mát við veruleikan, ein yvirbygningur, hvørs leiðsla higartil ikki hevur megnað at stýrt stovninum- tvørturímóti.

Miðflokkurin heitir staðiliga á landsstýriskvinnuna at steðga fráboðaðu uppsagnarætlanunum og at at krevja leiðslu landssjúkrahúsins at standa til svars fyri ómenniskjaligu og beinleiðis skaðiligu ætlanir sína

Tvær bøkur um frálæru innan fiskiídnaðin

Góðskutrygging í fiskiídnaðinum olg Innaneftirlit í fiskiídnaðinum. Hesi eru heitini á tveimum bókum, sum eru útkomnar. Bøkurnar eru úrslit av ein í verkætlan, sumhevur til endamáls at gera frálærutilfar um innaneftrilit í fiskiídnaðinum. Verkætlani er fíggjað av Fiskimálastýrinum.

Bókin »Góðskutrygging í fiskiídnaðinum« viðger vandamál fyri góðskuna á matvørum úr fiski, so sum bakteriur, virus, eiturevni, sníkar og annað. Bíkin viðger eisini vanligt mikrolívfrøðiligt eftirlit og krøvini til trygging av heilsugóðskuni á sjómati grundað á altjóða viðurkendu HACCP-skipanina. Herumframt eru kaptilar um reingerð og sóttreinsan í fiskiídnaðinum og krøv til innrætting av fiskavirkjum. Zakaris Svabo Hansen hevur týtt úr donskum eftir bók hjá Hans Henrik Huss. Bókin er 108 blaðsíur og kostar 150 kr.

Hin bóklingurin, »Innaneftirlit í fiskiídnaðinum« viðger uppbygging av eini innaneftirlitsskipan á fiskavirki ella verksmiðjuskipiæ. Øll myndugleikakrøv viðvíkjandi innaneftirliti verða viðgjørd og greitt verður frá, hvørjar skipanir ein fyritøka kann seta í verk fyri at lúka krøvini. Bókin gevur á henda hátt ítøkiliga leiðbeining um uppbygging og íverkseting av einum innaneftirlitskervi. Rithøvundur er Janet Fríða Johannesen. Bókin er 70 blaðsíður og kostar 100 krónur.

Bøkurnar, sum báðar fáar fyri, fara tær at verða nýttar. Fyrsta skeiðið byrjar 31. januar. Bøkurnar fara tó eisini at verða brúktar í vanligari undirvísing á Fiskivinnuskúlanum eins og at tær veru viðkomandi fyri øll fiskavirki og virki, sum virka aðrar matvørur enn tær úr fiski.

Grindir í Føroyum í 1999

Dagur		Hvalvág	Hvalir	Skinnatal	Slag
14.	mars	Tórshavn	132	1.357	grindahvalir
15.	juli	Sandavágur	112	809	grindahvalir
25.	juli	Bøur	72	449	grindahvalir
2.	aug.	Klaksvík	196	2.077	grindahvalir
30.	aug.	Vágur	15	68	grindahvalir
4.	sept.	Klaksvík	4	48	grindahvalir
8.	sept.	Vestmanna	34	423	grindahvalir
28.	sept.	Leynar	43	266 1/2	grindahvalir
Tils.	8 grindir við		608 grindahvalum uppá 5.398 1/2 ella 269 gyllin og 18 1/2 skinn		

Sjúkrarøktarstjórin er nú settur

EIRIKUR LINDENSKOV

Frá 1. apríl at rokna verður Marin Vang, sjúkrasystyr, sett sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum.

Marin Vang tók prógv sum sjúkrasystir í 1969. Hon tók víðariútbúgving til deildarsjúkrasystir og sjúkrasystralærara á Danmarks Sygeplejerskehøjskole í 1978 og framhaldsútbúgving innan leiðslu í sjúkrarøkt á Danmarks Sygeplejerskehøjskole í 1998. Umframt hetta hevur hon tikið lut á fleiri eftirútbúgvingum og skeiðum innan sjúkrarøkt, pedagogikk, leðislu og fyrisiting.

Hon hevur havt leiðandi størv innan fleiri sjúkrahús í Danmark. Eitt skifti var hon fyristøðukvinna á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Nú Marin Vang tekur við starvinum sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum, kemur hon út einum starvi sum varafyristøðukvinna á Diakonissestiftelsen Ældrecenter á Frederiksberg.

Jarðarferð

Kistan við

HERMAN JACOBSEN

ættaður úr Víkarbyrgi, búsitandi í Havn

fer frá Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 17.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13. Sálmabókin verður brúkt.

Familjunnar vegna

Hilmar og Danjal Johan Jacobsen

Soleiðis virka nýggju gjøldini

Føroya Tele hevur seinastu árini miðvíst arbeitt fram ímóti at fáa skapt tær neyðugu fortreytirnar fyri at lækka telefongjøldini í Føroyum.
Nú hevur Føroya Tele enn einaferð lækkað minuttgjøldini at galda frá 1. februar. Her eru nøkur dømi um, hvussu broytingarnar virka.

Smábrúkarin

Brúkar telefonina sjáldan. Tosar eina samrøðu um dagin og eina um kvøldið. Hvør samrøða er 3 minuttir.

Áðrenn	201,50
Aftaná	194,50
Sparing	6,70 kr
Sparing	3,33 %

Familjan

Miðalnýtsla: 10 samrøður um samdøgrið, av teimum 1/3 um dagin og 2/3 um kvøldið. Harafturat eru samrøður til fartelefon.

Áðrenn	563,95
Aftaná	503,40
Sparing	60,55 kr
Sparing	10,74 %

Miðalstóra virkið

Hevur 7 telefonir. Tær 7 telefonirnar hava hvør í miðal góðar 5 samrøður hvønn yrkadag, herav eisini uppringingar til fartelefon.

Áðrenn	2.858,00
Aftaná	2.439,00
Sparing	419,00 kr
Sparing	14,66 %

Fyri fólk, sum als ikki brúka telefonina, verður ein hækking upp á 26 kr. um mánaðin.
Omanfyri er bert roknað við uppringingum frá fastari telefon, og uttanlandssamtalur eru ikki tiknar við.

Talvan vísir gjøldini við mvg, sum tey verða frá 1. februar 2000.

	Verandi	1.februar 2000	Munur
Minuttgjald - fastnet dag	0,70	0,38	-45,7%
Minuttgjald - fastnet nátt	0,35	0,24	-31,4%
Minuttgjald - GSM dag	2,80	2,40	-14,3%
Minuttjgald - NMT dag	1,90	1,70	-10,5%
Minuttgjald - NMT nátt	0,95	0,90	-5,3%
Uppringingargjald	0,30	0,40	+33,3%
Mánaðargjald fastnet	89,00	115,00	+29,2%
Mánaðargjald ISDN	135,00	175,00	+29,6%
Mánaðargjald fartelefon	89,00	115,00	+29,2%

Legg til merkis, at tú sparir upp í 45% av minuttgjaldinum.

SANSIR TEL 355 355

Síggj neyvaru útrokningarnar fyri roknistykkini omanfyri á: www.tele.fo

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo